# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjørmund Mittelstein**, ættaður úr Sandavági, búsitandi í Havn andaðist týsdagin, 67 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 15. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellium fríggjadagin klokkan 14.

**Jóhannes Fredrik Karl Sofus Tauser**, føddur Poulsen, ættaður av Eiði, búsitandi í Helsingør í Danmark, andaðist á Helsingør Sygehus leygardagin 105 ára gamal. Jarðarferðin verður frá kapellet Helsingør Kirkegård leygardagin kl. 12.30.

**Kára Vægter Joensen**, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Høje Tåstrup, andaðist í heiminum mánadagin, 44 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Olentina Simonsen**
Klaksvík

doyði og varð jarðað.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávu til Norðoya Røktarheim

Gott nýggjár.

*Familjunnar vegna*
**Marjun, Ann og Beinir**

**Dagurin**
**18. januar. Prisca**. Ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir. Gomlu jól enda, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum. Dagurin verður eisini róptur gamli trettandi. Vilt tú verða ríkur, skal tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt. Magnus Heinason varð hálshøgdur hendan dagin í 1589.

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

# Realskúlaflokkur í 1942



Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýninginí, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Her er ein realskúlaflokkur í urtagarðinum hjá Richardi Long, lærara, í 1942.

**Aftasta rað f.v.:** Olivar Áarberg, Petur Lava Hansen, Johannes Nielsen, Eliesar Nolsøe og Ólavur Breiðá
**Miðraðið f.v.:** Richard Long, lærari, Maria Mortensen, Nanly Breckmann, Ingeborg Krog, Hilda Frýdal, Jóannes Rubeksen og Viggo Planck
**Fremst f.v.:** Elinborg av Kák Rasmussen, Aslaug Simonsen og Ingibjørg Kragesteen

*Myndaeigari: Jóannes Rubeksen*

Sosialurin fyri 25 árum síðan:

# Rútasorl í stórum stíli


tíðindablaðið
sosialurin

Gjalda skatt í Klaksvík men mugu dragsa olju í dunkum

Ongin reistu roykja

32—7

Býráðsfor

**Brot úr Sosialinum 18. januar 1983**

Herverk, innbrot og stuldur stóðu í døgnrapportini hjá politinum í Havn fyri leygardagin og sunnudagin.

Leygarnáttina vórðu 25 rútar knústir í Kommunuskúlanum og í Sankta Frans skúla vóru 10 rútar brotnir. Í Fimleikarhøllini í Sankta Frans skúla var ein eldsløkkjari tømdur út á gólvið og í barnagarðinum vórðu 2.500 krónur stolnar. Sunnunáttina var innbrot í handlinum hjá S.H. Jacobsen á Bryggjubakka, 4.000 krónur og eitt útvarpstól vórðu stolin. Sama vikuskiftið vórðu fimm persónar tiknir fyri spirituskoyring.

Annars skrivar blaðið m. a. at býráðið í Havn samtykti týskvøldið at seta Hanus Iversen, jurist, í starv sum skrivstovufulltrúa hjá býráðnum, at býráðið hevði eisini samtykt at einki verður gjørt burturúr at komandi ár eru 75 ár liðin síðan kommunan gjørdist keypstaður.

**Boykotta Ánirnar**
Í november góvust oljubilarnir hjá Esso og Shell í Klaksvík at koyra olju til fólk sum búgva norðuri í Ánunum, tí at vegurin til Árnirnar er ikki tryggur nokk, og tí at møguleikin fyri at venda tí stóra oljubilinum har norðuri eru rættuliga skerpaðir. Fólk í Ánunum vóru sera misnøgd við at tey, sum gjalda skatt í Klaksvík, verða noydd at dragsa olju heim í dunkum.

Í ritgerðarkappingini um torvarbeiði hjá Fróðskaparsetrinum fekk Petur J. Sigvardsen í Havn fyrstu virðisløn, John í Skemmuni í Porkeri fekk aðru virðisløn og Jákup Olsen í Sandvík fekk eyka virðisløn fyri fotomyndir. Inn komu 17 handrit. Í dómsnevndini sótu Maria Ejde Petersen, Kristian Djurhuus og Ólavur Clementsen.